Avgerðin hjá Tórshavnar Býráð:

Danska TV3 og BBC Prime

Hóast málið í eygunum á mongum ikki hevur tað stóra upp á seg, tók tað Tórshavnar Býráð hálvantriðja tíma hóskvøldið at finna útav, hvussu Rás Tórshavn skal senda framyvir – fyribils í eina royndartíð, sum verður upp á einar tveir mánaðir

Tórshavn: Hóskvøldið kl. 18 var býráðsfundur í Havn. Tilsamans seks mál vóru á skránni, men burtur sæð frá tí eina vóru hini fimm stórt sæð bert avgreiðslumál, ið tóku millum lítla og onga tíð at fáa frá hondini.

Hetta eina málið, ið fór avstað við at kalla allari tíðini tann hálvatriðja tíman, býráðsfundurin vardi, var málið um Rás Tórshavn.

Í eygunum á mongum hevur hetta mál ikki tað stóra upp á seg, og og onkur av býráðslimunum umrøddi tað eisini sum eitt »luksus-prosjekt«. Kortini fekk tað drúgva viðgerð á fundinum, og tilsamans vóru atkvøðugreiðslurnar ikki færri enn fimm í tali, áðrenn komið var á mál, og nøkur endalig samtykt varð gjørd viðvíkjandi Rás Tórshavn.

Niggju atkvøddu fyri broytingini

Endin var so tann, at Tórshavnar Býráð við níggju atkvøðum fyri og ongari ímóti samtykti í eini royndartíð at leggja verandi útgávu av TV3 niður og senda dansku útgávuna í staðin, og í sambandi við broytingarnar hjá BBC at senda rásina BBC Prime.

Viðvíkjandi TV3 hevur higartil verið send norska útgávan, men á miðdegi í gjár tók ein teknikari frá Telefonverki Føroya og skifti yvir til dansku útgávuna.

Tá talan er um BBC, er støðan tann, at hóskvøldið kl. 19 gavst BBC við at senda BBC World Service, ið hevur verið frammanundan. Í staðin eru komnar tvær BBC-ræsur – undirhaldsrásin BBC Prime og tíðindarásin BBC World. Býráðið kundi frítt velja millum hesar báðar ræsurnar, og endaliga valið fall so á BBC Prime, ið longu av sær sjálvum kom á skermin hjá Rás Tórshavn hóskvøldið kl. 19.

Fýra aðrar atkvøðugreiðslur

Áðrenn komið varð til hesa avgerð, vórðu ikki færi enn fýra aðrar atkvøðugreiðslur avgreiddar fyrst. Tann fyrsta mitt undir orðaskiftinum eftir uppskoti frá Leivi Hansen, ið vildi hava málið beint aftur í nevnd. Hetta uppskoti fall við fimm atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Eisini skuldi býráðið taka støðu til eitt uppskot frá Arnsteini Niclasen um at sløkkja fyri TV3 og heldur stuðla útgávu av bókum og bløðum, men hetta uppskoti fekk bert tvær atkvøður, meðan fýra vóru ímóti.

Eins lítla undirtøku fekk minnilutatilráðingin hjá Leivi Hansen úr mentamálanevndini um at varðveita verandi TV3-rás, av tí at hann helt grundgevingina fyri at skifta norska TV3 út við tað danska vera ov veika. Tann tilráðingin fekk tvær atkvøður, meðan fýra vóru ímóti.

Og endaliga, áðrenn býráðið skuldi taka støðu til tilráðingina frá býráðsformanninum, var til atkvøðugreiðslu uppskot frá Tórfinni Smith um heldur at velja BBC World enn BBC Prime, tí nóg mikið av undirhaldi frammanundan er at sígja á hinum ræsunum. Fýra býráðslimir tóku undir við hesum uppskoti, meðan seks vóru ímóti.

Lógligt ella ikki lógligt

Undir orðaskiftinum kom fram, at danska TV3 við eitt nú rúsdrekkalýsingum brýtur føroyska lóggávu viðvíkjandi lýsingum í føroyskum fjølmiðlum, og í hesum sambandi ætlaði Jenis av Rana eisini at seta fram eitt uppskot til atkvøðugreiðslu.

Hann vildi hava, at bert varð skift yvir til danska TV3, um tað var treytað av, at hetta ikki beinleiðis stríddi móti landsins lógum. Men hetta uppskotið kom ongantíð til atkvøðugreiðslu, og í staðin er lovað honum, at hesin parturin av málinum skal kannast seinni. Víst varð eisini á, at eisini aðrar av ræsunum hava rúsdrekkalýsingar, og at tað tí kundi føra til størri broytingar, um allar hesar ræsurnar brutu landsins lógir.

Royndartíðin við danska TV3 og BBC Prime verður helst tveir mánaðir. Hvat so fer at henda, velst óivað um, hvussu fólk taka móti teimum báðum broytingunum, ið nú eru gjørdar.

hj.

»GULLKORN« Í ORÐASKIFTINUM UM RÁS TÓRSHAVN:

Franskar orgasmur, einkarrættur og rúsdrekkalýsingar

Her prenta vit nøkur av teimum stuttligastu og mest merkisverdu orðunum, ið søgd vórðu á býráðsfundinum í Havn hóskvøldið, tá Rás Tórshavn var til viðgerðar. Tað var so sum so við dygdini á orðaskiftinum, men undirhaldandi var tað í hvussu er…

»Gullkornini í býráðnum hóskvøldið – í teirri raðfylgju, tey komu fram:

Leivur Hansen:

At málið um norskt ella danskt TV3 kemur fram, av tí at 15-20 persónar hava vent sær til býráðsformannin, gevur einum varhugan av, at tað er ikki eiti á sømdir, summir av borgarnunum fáa.

– – –

Meðan kjakið gongur útfrá, um vit skulu hava norskt ella danskt TV3, so havi eg latið mær fortalt, at svenska TV3 er betri enn hini bæði. Vit hava eisini sum er nóg mikið av donskum, so hví ikki taka og viðka sjónarringin? Tit mugu ikki lata undirbrotligheitina taka ræðið av tykkum!

– – –

At sagt verður, at hetta er ein royndartíð, er bert ein undanførsla fyri at fáa ta dansku TV3-útgávuna ígjøgnum.

– – –

Blaðskrivingin yvirhøvur um hetta mál og kanningin í Sosilinum hava verið tendensiøs.

– – –

Kommunan hevur annað og meira at brúka pengar til í hesum tíðum, enn eitt sovorðið »luksus-prosjekt«. Meðan vit viðgera hetta, er onnurhvør gøtulykt sløkt og vegirnir í vánaligum standi.

– – –

Eg var hugtikin av viðmerkingini í »Náttarravnunum« herfyri, har sagt varð, at býráðið nú skuldi taka støðu til, um tær fronsku orgasmurnar skuldu vera við norskum ella donskum teksti.

Heðin Mortensen:

Rás Tórshavn hevur verið ein góð íløga, tí vit eru sloppin undan at sígga allar parabolarnar runt um í Havnini, og tað var eisini ætlanin við hesum.

– – –

Tá Leivur Hansen tosar um dygdina á TV3, so haldi eg ikki, at Sjónvarp Føroyar er stórt frægari, um sæð verður burtur frá føroysku sendingunum og tíðindasendingunum.

– – –

Eg haldi, at vit eiga at kanna møguleikarnir fyri at fáa loyvi frá landsstýrinum til eina rás aftrat, og tá kunnu vit so fara undir at viðgera tann spurningin av nýggjum. I hvussu er haldi eg avgjørt, at tað hevði verið best, um vit fingu eina rás, tí so sluppu vit undan at skula velja millum báðar BBC-ræsurnar, ið eru hvør betri enn onnur.

Tórfinn Smith:

Tað allarringasta við hesum máli er, at so fá fólk nú skulu gera av, hvat so mong skulu sleppa at sígga og ikki. Eg hati at skula ráða fyri, hvørjum grannin hjá mær hyggur at í sjónvarpinum. Tí loyvi eg mær at ivast í kompetansuni hjá hesari forsamlingini.

– – –

Eg gangi heldur ikki so høgt uppí, um vit skulu hava norskt ella danskt TV3. Summi vilja óivað hava danskt, av tí at tað er danskt, meðan onnur vilja hava norskt, av tí at tað *ikki* er danskt. Og so eru tað aftur summi, ið vilja hava norskt TV3, av tí at tað ikki er so illavorðið sum danskt, meðan onnur vilja hava danskt TV3, júst tí tað er meira illavorðið enn norskt.

– – –

Onkrir lærarar hava eisini sagt mær, at tað gongur út yvir skúlanæmingarnar í donskum, at teir sígga so nógv norskt, og tí blanda hesi bæði málini saman.

– – –

Tá talan er um BBC, so

Javnaðarumboðini í Tórshavnar Býráð, Tórfinn Smith og Elin Lindenskov. Tórfinn legði fram uppskot um at fáa BBC World í staðin fyri BBC Prime. Hann grundgav fyri hesum við, at nóg mikið undirhald var á hinum ræsunum frammanundan.

Mynd: Hilmar Jan Hansen